FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvsølan

**87 bátar seldu sløk 29 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mánadagin. Sølan hjá einstøku bátunum og býti av samlaðu veiðuni framgongur av yvirlitinum niðanfyri. Sølan um telefonuppboðssøluna er ikki íroknað**

| Syslunummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 18 | Sirið | lína | 160 |
| FD 79 | Havørnin | snella | 408 |
| FD 117 | Gerðisbáturin | snella | 43 |
| FD 123 | Riddarin | snella | 126 |
| FD 131 | Høghamar | snella | 597 |
| FD 176 | Helen | lína | 683 |
| FD 229 | Camilla | snella | 37 |
| FD 250 | Halgerð | lína | 331 |
| FD 256 | Aðnasker | snella | 57 |
| FD 268 | Selnes | snella | 58 |
| FD 310 | Sjóberin | lína | 152 |
| FD 316 | Annfrið | snella | 597 |
| FD 329 | Karin 3 | lína | 489 |
| FD 33 | Krabbin | snella | 213 |
| FD 348 | Skoratindur | snella | 277 |
| FD 351 | Vinur | snella | 43 |
| FD 363 | Líðarbrúgv | snella | 204 |
| FD 367 | Báran | snella | 422 |
| FD 377 | Julia | snella | 521 |
| FD 386 | Slættiklettur | snella | 159 |
| FD 390 | Elisabeth | snella | 326 |
| FD 421 | Hjallur | snella | 283 |
| FD 472 | Støðin | snella | 758 |
| FD 477 | Norðkapp | snella | 132 |
| FD 492 | Klettur | lína | 314 |
| FD 512 | Nabbi | lína | 93 |
| FD 557 | Fiskivarði | lína | 471 |
| FD 660 | Falkurin | snella | 334 |
| FD 733 | Rivtangi | snella | 1.049 |
| FD 775 | Langanes | snella | 512 |
| FD 780 | Bakkafossur | snella | 200 |
| FD 784 | Vónin | snella | 295 |
| FD 80 | Norðbúgvin | snella | 386 |
| FD 863 | Heiði | snella | 312 |
| FD 905 | Trúgvi | lína | 159 |
| FD 954 | Vørðan | snella | 497 |
| FD 981 | Másin | snella | 115 |
| FD 983 | Joan m/b | snella | 313 |
| FD 984 | Tvey systkin | snella | 242 |
| FD1054 | Aldubáran | snella | 97 |
| FD1098 | Bylgjan | snella | 79 |
| FD1116 | Frida | snella | 937 |
| FD1142 | Durita | snella | 126 |
| KG 125 | Bjarnaberg | snella | 76 |
| KG 189 | Vátiklettur | lína | 1.486 |
| KG 241 | Fremad | lína | 540 |
| KG 301 | Másasteinur | snella | 54 |
| KG 522 | Svartaberg | lína | 420 |
| KG 661 | Rýpan | kalvalína | 133 |
| KG 666 | Sjóvarfossur | snella | 65 |
| KG 705 | Sonja | snella | 388 |
| KG 708 | Vársól | lína | 139 |
| KG 92 | Øldan | snella | 454 |
| SA 110 | Netjan | snella | 108 |
| TG 140 | Jytte | snella | 58 |
| TG 26 | Majbritt | snella | 270 |
| TG 349 | Trý drangur | snella | 476 |
| TG 435 | Jórun | snella | 168 |
| TG 508 | Magnhild | snella | 33 |
| TG 56 | Marian m. | snella | 265 |
| TG 592 | Jenny b | snella | 245 |
| TG 628 | Alis t | lína | 60 |
| TG 670 | Víkaberg | snella | 463 |
| TG 797 | Norðfarið | snella | 175 |
| TG 848 | Sjóløvan | snella | 86 |
| TN 164 | Borgarklettur | snella | 405 |
| TN 270 | Torgun | snella | 401 |
| TN 357 | Jensia | snella | 88 |
| TN 381 | Sancy | snella | 599 |
| TN 390 | Trý systkin | lína | 1.163 |
| TN 417 | Gunbjartur | snella | 1.020 |
| TN 561 | Safir 4 | snella | 1.103 |
| TN 753 | Tóra | lína | 38 |
| TN 897 | Maj-N | snella | 129 |
| TN 91 | Lómur | snella | 203 |
| TN1090 | Annika | lína | 721 |
| TN1106 | Báran | snella | 358 |
| VN 121 | Sjódrangur | snella | 234 |
| VN 125 | Ægir | snella | 177 |
| VN 136 | Sævar | snella | 198 |
| VN 156 | Hanus á Bø | snella | 36 |
| VN 168 | Vitin | snella | 561 |
| VN 209 | Laksurin | snella | 91 |
| VN 267 | Jenny m/b | snella | 156 |
| VN 378 | Turið | snella | 133 |
| VN 408 | Jónvør | snella | 1.224 |
| VN 61 | Sjóarklettur | snella | 49 |

| Vorunavn | kilo |
|---|---|
| Annað | 7 |
| Brosma 0 | 195 |
| Brosma 3&4 | 4 |
| Hýsa 0 | 34 |
| Hýsa 1 | 484 |
| Hýsa 2 | 1.745 |
| Hýsa 3 | 1.316 |
| Hýsa 4 | 945 |
| Havtaska 0 | 5 |
| Hvítingur 0 | 145 |
| Kalvi 2 | 78 |
| Kalvi 3 | 11 |
| Kalvi 4 | 33 |
| Kongafiskur 0 | 6 |
| Kongafiskur 2&3 | 44 |
| Longa 0 | 94 |
| Longa 1 | 7 |
| Longa 2 | 23 |
| Longa 4&5 | 10 |
| Reyðsprøka 0 | 18 |
| Skrubba | 8 |
| Steinbítur | 99 |
| Tindaskøta | 6 |
| Toskur 1 | 131 |
| Toskur 2 | 664 |
| Toskur 3 | 6.675 |
| Toskur 4 | 10.476 |
| Toskur 5 | 4.510 |
| Upsi 0 | 696 |
| Upsi 2 | 99 |
| Upsi 3 | 243 |
| Upsi 4 | 45 |


DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin




# Kanna nú ILA kring landið

Landsdjóralæknin er nú farin at kanna um ILA sjúkan hevur breitt seg aðrastaðni enn í ILA okinum, sum higartil fevnir um Fuglafjørð, Oyndarfjørð og Funningsfjørð. Fyrst verður alifiskurin á Gøtuvík kannaður. Síðan verður farið til aliringarnar á Kunoyarnesi og ætlanin er eisini at kanna aliringarnar á Lambavík. Blóðroyndir verða tiknar av fiskinum og hesar verða síðan sendar til ein kanningarstovn í Oslu til nærri kanningar.

ILA virusið kann breiða seg sera skjótt, men tað kann eisini ganga drúgv tíð. Hetta vísa royndir í Noregi.




# Leiðari til fiskiídnaðargransking

Fiskirannsóknarstovan søkir í bløðunum í dag eftir einum leiðara til eina verkætlan innan fiskiídnaðargransking.

Verkætlanir undir fiskivinnuroyndum skulu kannast og eftirmetast í 2001. Serliga skal metast um endamál, týdning, mannagongdir, eftirlit og almannakunngerð av úrslitunum.

Út frá hesum skal eitt uppskot um setning og arbeiðslag framyvir gerast og setast í verk. Eisini skal viðgerast á hvørjum økjum fiskiídnaðargransking kann mennast og skipast í Føroyum. Út frá niðurstøðunum vera uppskot til fiskivinnuroyndir í 2002 - 2004 skipaðar og lagdar fyri Fiskimálastýrið.

Arbeiðið verður stýrt av einum leiðslubólki mannaður am umboðum frá Fiskirannsóknarstovuni, Menningarstovuni, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Ráfiskakeyparafelagnum og Ráfiskaseljarafelagnum.

Umsøkjarin skal hava førleika innan fiskiídnaðargransking

# 11 russiskir trolarar í arrest í Noregi

Øll minnast russiska trolaran Adonkin, sum lá eitt mannaminni í arrest á Skála. Tá eitt skip liggur í arrest, so skyldar tað pengar og teir sum eiga pening til góðar hava lagt hald á skipið.

Seinasta leygardag stevndi ein fullsettur bussur norður úr Aalesund. Í bussinum vóru russiskir sjómenn, sum seinastu seks mánaðarnar høvdu verið við russiska skipinum »Alexandr Mashakaov« Seinastu seks mánaðarnar hevur skipið ligið í arrest í Aalesund og fleiri av manninginum hava verið leingi heiman. Bussurin koyrdi norður eftir móti Murmansk, ein langur teinur, skrivar Aftenbladet.

Reiðaríið skyldar pening í einum russiskum banka og til eitt norskt felag. Manningin sigur, at teir eiga minst 30.000 dollarar til góðar hjá reiðarínum.

Aftenposten skrivar, at manningin var glað, nú leiðin gekk heim, men teir óttaðurs framtíðina. Teir vildu fegnir fingið peningin, áðrenn teir fóru úr Noregi, men teimum er lova, at peningurin skal gjaldast, tá teir koma heim til Murmansk. Teir vilja hava peningin í dollarum, og stúra fyri at fáa hann í rublum, sum lítið og einki virði hevur.

Norðmenn hava somu trupulleikar við russiskum skipum í arrest sum føroyingar, tá russisk skip vóru dagligir gestir á Skála Skipasmiðju



# ILA sjúkan í Sogn og Fjordane

Nú er ILA sjúkan aftur staðfest í Gulen kommunu í Sogn og Fjordane í Noregi. Hetta er sætta árið á rað, at sjúkan er staðfest í hesi kommunu.

Kanningar eru tiknar í vikuskiftinum og tær vístu at fiskurin hevði fingið ILA. Nú verður óttast fyri, at sjúkan fer at breiða seg.

Enn hevur økisdjóralæknin Trond Arild Henriksen ikki givið boð um at taka fiskin. Hann sigur við blaðið Firda.

– Nú mugu vit hyggja eftir hvussu gongst. Viðhvørt spreiðir virusið seg skjótari enn aðrar tíðir og viðhvørt gongur long tíð, sigur hann.

Alibrúkið sum er rakt av ILA hevur 400.000 laksar, sum viga trý pund stykkið gangandi í ringunum.

# Íslendingar halda fram við at tveita fisk út aftur

Sjálvt um íslendingar fingu størri kvotur, so heldur ein meiriluti av teimum sum vóru spurdir í eini stórari kanning um útblaking av fiski, at útblakingin fer at halda fram. Tá undirmálsfiskur telur við í kvotuni og nógv minni prísur fæst fyri hann, so er ongin grund hjá fiskimonnunum at taka hendan við til lands, serliga tá revsingin ikki er serliga stóra fyri at vera tikin og ringt er eisini hjá vaktarskipunum at finna skip sum tveita út.

60 prosent av teimum spurdu halda, at teir fara at halda fram við at tveita fisk út aftur, sjálvt um kvoturnar vóru størri. 31 prosetn av teimum spurdu halda, at orsøkin til útblakingina er ov smáar kvotur.

Tá kvoturnar eru so smáar, so ræður um at fáa so stóran fisk sum gjørligt, tí hesin hevur besta prísin.

# Russar troyttir av norðmonnum

Ósemja um fiskikvotur og norskt keyp av russiskum fiski hevur gjørt norðmenn illa dámdar í Russlandi. Hetta skrivar Aftenposten. Blaðið hevur tosað við Thor Robertsen í Finmark Fylke. Finnmark Fylke er er tað fylkið í Noregi, sum hevur tættast samband við russar

Thor Robertsen sigur, at seinastu tíðina eru norðmenn meira og meira illa umtóktir í Ruslandi. Russar halda, at norðmenn skera ov nógv niður í kvotunum í Baretshavinum, hóast tað ikki er neyðugt.

– Russland ynskir hægri kvotur fyri at vinna pening og noreg hevur ráð til at bíða, sogur Thor Robeertsen.

Í Russlandi eru fólk eisini hørm um at norðmenn keypa millum 60-70 prosent at tí fiski, sum russar veiða í Barentshavinum. Samstundis liggur tann russiski fiskiídnaðurin lamin og arbeiðsloysi er ovurhonds.

At norðmenn tóku ein russiskan trolara við Svalbard hevur bara stoytt bensin á bálið. Robertson heldur at russar nú royna heldur at knýta tættari bond við Finnland og á tann hátt at fáa betri samband við ES.